TÓRSHAVNAR KOMMUNA

## Barnaansingin í Tórshavnar kommunu

Tórshavnar kommuna søkir vegna:



Í dagstovninum í Kaldbak ganga 16 børn. 5 starvsfólk arbeiða á stovninum. Stovnurin er ein blandaður stovnur við vøggustovu, barnagarði og frítíðarskúla.

### Dagstovnin í Kaldbak eftir:

- tveimum pedagogum at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. mars 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Vit bjóða**
tvey áhugaverd størv, har starvsfólkið, saman við leiðaranum fær møguleika fyri at seta dám á stovnin og taka lut í øllum tí, sum krevst fyri at stovnurin skal virka eftir ætlan.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Jensinu Magnussen, stovnsleiðara, tlf 302410 ella 273766.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Dagstovninum í Kaldbak, Flatnagarður, FO-180 Kaldbak, í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. februar 2005.



Í Býlingshúsinum á Norðasta Horni eru 3 stovur, tilsamans eru 49 børn og 10 starvsfólk.

### Býlingshúsið á Norðasta Horni eftir:

- einum pedagogi til barnagarðsstovuna Innistova at starvast 36 tímar um vikuna at byrja 15. mars 2005 ella eftir nærri avtalu.
- einum pedagogi til barnagarðsstovuna Uppistova at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 15. mars 2005 ella eftir nærri avtalu.

**Vit bjóða**
eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum. Dentur verður lagdur á at børnini fáa avbjóðingar bæði innandura og uttandura, og at tú megnar at skapa ein tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Óla Midjord, stovnsleiðara tlf. 210906.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Býlingshúsinum á Norðasta Horni, Granagøta 5, FO-100 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 14. februar 2005.

### Setanarviðurskifti

Omanfyri standandi størv verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

- onnur leys størv? Hygg á www.torshavn.fo

# Bátur til sølu

## Aramis 30 BCF



- **Báturin hevur fiskiloyvi**
- **Útgerð:**
- 5 el-snellur, línuspæl, 24 fj. Radara, ekkolodd, plottara, GPS´ara.
- **Motorur:** Ford Mermaid 212 hk.
- Tlf. 212962

FØROYA LANDSSTÝRI

**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

# Stuðlar til Stuðulsskipanina fyri vaksin

Stuðulsskipanin fyri vaksin fevnir um alt landið, og hevur til endamáls at veita sosialpedagogiska hjálp, fylgi, eftiransan og umsorgan. Harumframt eru røktaruppgávur, sum eru skipaðar í samstarvi við Heimarøktina.

**Stuðulskipanin fyri vaksin ynskir stuðlar, ið m.a.:**

- kunnu arbeiða sjálvstøðugt og einsamøll í heimi brúkarans og samstundis eisini kunnu átaka sær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión
- vísa áhuga og virðing og samstundis vera professionellir
- eru stuðlandi og hjálpa brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum
- eru sterkir - bæði til sálar og likam
- kunnu handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan

**Søkt verður eftir stuðli til:**
**Sandavágur**
**Kvinna við ALS - Vøddasvinn.** Talan er um eitt barsilsvikariat í 36 tímar um vikuna, við skiftandi vaktum. At byrja 01.03.05 til 01.01.06.
Freistin at søkja er 15. feb. 2005

**Eysturoy**
**19 ára gomul seinment genta, ið situr í koyristóli.** Uppgávurnarar eru m.a. at fylgja henni til ymiskar aktivitetir og stimbra hana í dagligdegnum. Koyrikort krevst. Talan er um 15 tímar um vikuna, at byrja 1. feb. 2005.

**Klaksvík**
**Kvinna 58 ár, við sálarligum trupulleikum.** Uppgávurnar eru m.a. at hjálpa og vegleiða hana í tí dagliga. Talan er um 10 tímar um vikuna, at byrja sum skjótast.

**Kvinna 47 ár, við sálarligum trupulleikum.** Uppgávurnar eru m.a. at stimbra hana í teimum dagligu uppgávunum í heiminum og at fáa ein innihaldsríkan dagligdag. Talan er um 10 tímar um vikuna, at byrja sum skjótast.

**Lønar- og setunartreytir:**
Talan er um størv innan Heimarøktina og Serforsorgina og roknast má við, arbeiðstíðirnar av og á eru skiftandi dag-, kvøld, og vikuskiftisarbeiði.
Løn sambært viðkomandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita hjá serráðgeva, Odu Johansdóttir, tlf: 354024 el. Fía Jespersen, tlf: 344025.

Umsóknir saman við útbúgving, royndum og møguligum viðmælum, skulu sendast til:

**Stuðulsskipanin fyri vaksin**
att.: Oda Johansdóttir
Løkjatún 1 · FO-160 Argir
Tlf. 354020 · Telefax 354021

Visti tú ikki tað? Sosialurin

Lesið Sosialin -so eru tit við!